

# Bygdarfólkið letur væl at

**Hóast rokaligt og nógv fólk, so dugir Jóannes Paturrson, bóndi í Kirkjubø, ikki at síggja nakran trupulleika í, um festivalurin var hildin aftur næsta ár**

VIÐ MÚRIN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Hann lat bø til stóran part av festivaløkinum, sum 7000 vitjandi gjøgnum eitt langt vikuskifti – frá mikukvøld til sunnumorgun – gingu upp og niður.

– Tað hevur verið rokaligt, men tá hugsað verður um, hvussu nógv fólk hava verið her, hevur tað bara gingið væl, segði Jóannes Patursson, bóndi, við Kringvarpið í gjár.

Sambært honum letur bøurin ikki til at hava fingið skaða av festivalinum.

– Tað hevur verið nógv ferðsla, men eg haldi ikki tað bilar fyri bøin, segði hann.

Bygdin lítið merkt

Jóannes Patursson dugir tískil heldur ikki at síggja tann stóra trupulleikan í, at festivalurin verður hildin í Kirkjubø aftur komandi ár.

– Sum eg skilji, hevur bygdin ikki merkt tað stóra til festivalin, tí gestirnir hava hildið seg innanfyri. So um upprudding og alt annað verður væl framt, so trúgvi eg ikki tað er nakað til hindurs fyri, at festivalurin verður aftur, segði Jóannes Patursson við Kringvarpið í gjárkvøldið.

# Liggja nú á øllum fýra

**Fyri tey allarflestu er festivalurin við Múrin av á hesum sinni, men fyrireikararnir handan festivalin í Kirkjubø liggja nú á øllum fýra, so bóndin fær lendi aftur í góðum standi**

VIÐ MÚRIN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Treytin fyri at lána lendið í Kirkjubø, har festivalurin við Múrin varð hildin, var, at tað verður latið aftur í sama standi, sum tá teir fingu tað.

– Hetta er eitt lendi, fólk liva av, og tá vit hava lovað hetta, so fara vit niður á øll fýra, so bøurin verður klárur aftur, sigur Mark Joensen, stjóri á festivalinum við Múrin í Kirkjubø.

Teir hava lænt lendið frá bóndanum Jóannes Patursson. Við Kringvarpið segði hesin í gjár, at tey bara kundu lata væl at festivalinum. Tað sama ger Mark Joensen um Jóannes Patursson.

– Hann hevur verið heilt ótrúliga hjálpsamur og hevur stóra tøkk uppiborið, tí uttan hann hevði tað illa borið til, sigur Mark Joensen. Hann ger eisini greitt, at tað ikki eru nøkur fá, men ein rúgva, ið eru orsøk til, at festivalurin við Múrin í Kirkjubø gjørdist veruleiki.



*7000 fólk og 30 tónleikabólkar og einstaklingar vitjaðu í Kirkjubø um vikuskiftið, har festivalurin við Múrin varð hildin*
*Myndir: Beinta Haraldsen*

# næsta ár

tá alt er talt saman og gjørt upp. Harumframt eru eisini 30 tónleikabólkar og einstaklingar, og so mong fólk hava ongantíð áður vitjað í Kirkjubø eitt vikuskiftið.

Spurdur beinleiðis, viðgongur Mark Joensen, at teir eru ógvuliga væl nøgdir við festivalin.

– Hetta var ein stór succes. Alt bendir á, at tað melur runt. Og hóast tað ikki er tað stóra yvirskotið, so sær tað bara gott út, sigur Mark Joensen, festivalfyriskipari.